## Hundamótasýning í SMS

Hundadagur verður í SMS leygardagin frá tí at sølumiðstøðin letur upp kl. 10.00 til hon letur aftur kl. 16.00. Á hundadegnum verður høvi at kunna seg um hundafelgið og virksemi teirra. Eisini verður høvi at heilsa uppá hundar á Torginum. Hæddarpunktið á degnum verður kl. 15.00, tá hundafelagið saman við Beintu Vilhelmsen skipar fyri hundamótasýning á torginum í SMS.



## Tiltøk ímóti veðrinum

Leiðarar hjá indiánarum og inuittum í Alaska hava handað amerikonsku Kongressini eitt skriv, har teir hava heili 150 krøv um tiltøk, sum politikararnir eiga at seta í verk fyri at tálma veðurlagsbroytingunum. Í skrivinum vísa teir millum annað á, at longu nú vænta serfrøðingar, at fólkið má flytast úr fleiri bygdum. Endamálið við krøvunum er at fáa Kongressina at skipa fyri einari hoyring um broytingarnar í Alaska, skrivar blaðið Sermitsiak.

# Altjóða íblástur um Múrin

**Fornfrøðingarnir á Fornminnissavninum hava júst havt forkunnuga vitjan av altjóða serfrøðingum innan múr, mørtel, stein og annað sum er viðkomandi fyri eina góða varðveiting av Kirkjubømúrinum**



*Føroyskir og útlendskir serfrøðingar hava seinastu dagarnir viðgjørt teknisku spurningarnar í samband við varðveitingina av Kirkjubømúrinum*

FORNMINNI

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Varðveitingin av Kirkjubømúrinum krevur stóra fyrireiking, tí Múrurin er okkara týdningarmesta fornminni, og eitt vánaligt varðveitingararbeiði kann skaða meir, enn tað gagnar. Hetta sigur leiðarin á Fornminnissavninum, Andrass Mortensen.

Sum ein liður í hesum fyrireikingararbeiði hevur Fornminnisavnið júst skipað fyri eini serfrøðingaráðstevnu við luttakarum úr Danmark, Finlandi, Svøríki, Englandi og Føroyum.

Símun V. Arge, deildarleiðari fyri fornfrøðideildini á Føroya Fornminnissavni, sigur at Fornminnisavnið við hesum tekur málið um múrin upp aftur, eftir at tað hevur ligið stilt í eina tíð.

Luttakarnir á ráðstevnuni hava øll drúgvar tekniskar royndir innan ymisk øki, og ráðstevnan skal varpa ljós á, hvat er neyðugt at gera, og hvør er best gongda leiðin at fara.

Føroysku fornfrøðingarnir ynskja ikki at gera sama feil, sum mynduleikar aðrastaðni hava gjørt. Í Rom, har nógvar fornleivdir eru, og nógv varðveitingararbeiði er gjørt, brúka mynduleikarnir í dag nógvar pengar at rudda upp og fjerna restaureringar, tí tær ikki eru nógv væl gjørdar og syntetiskt tilfar er brúkt.

- Innan altjóða varðveitingarbeiði er rákið, at ein vendur aftur til tað upprunaliga og roynir at brúka tilfar, sum er so upprunaligt sum møguligt, sigur Símun V. Arge.



*Í eitt ár hava mátitól staðið á Múrinum og skrásett til dømis miðalhitan á vegginum hvønn tíma á døgninum. Poul K. Larsen frá Nationalmuseets Bevaringsafdeling sigur, at mátingarnar vísa, at verjan ger mun, tí hon bæði turkar og stabiliserar hitan*



*Mette Marciniak, arkitektur og steinhøggari frá Slots- og Ejendomsstyrelsen, og Tim Padfield, Conservation Scientist úr Englandi, práta við Símun V. Arge, leiðara á Fornfrøðideildini á Fornminnisavninum*

Tí hevur Fornminnissavnið bjóða fólki við servitan innan miðaldarlig kálksløg, varðveitingar mørtel, og nátursteinsløg til Føroya at geva íblástur.

Poul K. Larsen frá Nationalmuseets Bevaringsafdeling hevur staðið fyri klimakanningunum av Kirkjubømúrinum. Í eitt ár hava mátitól staðið á Múrinum og registrerað t.d. miðalhitan á vegginum hvønn tíma á døgninum. Poul K. Larsen sigur, at mátingarnar vísa, at verjan ger mun, tí hon bæði turkar og stabiliserar hitan.

Klimakanningarnar skulu brúkast sum grundarlag fyri avgerðini um, hvat slag av vernd Múrurin skal hava í framtíðini.

Andrass Mortensen, Landsantikvarur, sigur at tað etisk rættasta er, at varðveita Múrin sum eina toft og so órørdan sum møguligt.

- Aðrastaðni hava tey nógv sløg av ruinum, men í Føroyum hava vit bara hesa einu. Tí er tað ikki líka mikið, hvat verður gjørt við Múrin. Tað at hann stendur sum toft gevur vitjandi eina heilt serliga uppliving av mentunarliga rúminum. Ein toft sigur nógv í sær sjálvum.

Men samstundis sum Fornminnisavnið ynskir at varðveita Múrin so upprunaligan sum møguligt, so leggur Andrass Mortensen dent á, at tað er ein skylda at tryggja at leivdirnar verða vardar og røktar.

Kanningarnar av Múrinum skulu verða lidnar um eitt ár. Síðani skulu tær brúkast til støðutakan um, hvussu Múrurin skal varðveitast, og til at formidla og kunna vitjandi, um Múrsøguna.

Leiðarin á Fornminnisavninum, Andrass Mortensen, sigur, at alt hetta arbeiði krevur pengar, men hann væntar ikki at figgingin verður nakar trupuleiki.

- Eg vænti, at politiskur vilji er, til at gjøgnumføra bæði skrásetingararbeiði og kunningararbeiði. Hetta er hóast alt okkara týdningarmesta fornleivd, sigur hann.

Í Heyst verður aftur ein serfrøðingaráðstevna um Múrin. Tá verður árligi norðurlendski fundurin um múrar og toftir hildin í Føroyum.